## Boys In A Band á Myspace

Stjørnuskotini Boys In A Band eru millum mest spennandi nýggju tónleikanøvnini í Føroyum. Nú er bólkurin at hoyra á alnetinum.

Eins og nógvir aðrir føroyskir bólkar, hevur Boys In A Band fingið sær ein profil á Myspace, har ber til at hoyra tónleikin, ið hevur fingið dómsnevndina til Planet Awards at peika á hendan bólk, sum eitt av uppskotunum til besta nýggja bólk á stóra føroyska tónleikahátíðarhaldinum, ið verður 27. januar. Har liggja tey bæði løgini Secrets To Conceal og Black Diamond Train.

Vitjað bólkin á http://www.myspace.com/boysinaband

**nud**



# Kristleif On The Road

**Í samband við at Kristleif stutt fyri jól gav út aðru fløgu sína On The Road, fer hann komandi dagarnar at hava konsertir kring landið saman við bólki sínum.**

TÍÐINDASKRIV

Konsertferðin byrjar við útgávukonsert og móttøku í Miðlahúsinum mikudagin 17. kl. 20.00

Síðan verður spælt í Klaksvík, Tórshavn og Vági.

On The Road er næsta útspælið frá kollfirðinginum sum tók øll av bóli við at vinna singer/songwriter kappingina hjá Hotel Hafnia í 2004, hóast hann var eitt heilt óskrivað blað tá.

Eftir hettar kom so hansara fyrsta solo-fløga út, talan var tá um eina sera lovandi fløgu.

Tað hevur ikki verið nógv at hoyrt til Kristleif seinasta árið, men hann hevur ikki ligið stillur fyri tað. Búsitandi í Danmark hevur hann fyrireikað og tikið upp sangirnar saman við Christopher Juul í LAVA studios.

Úrslitið er ein sera beinrakin og erlig útgáva, sum lyftir arvin eftir fyrru fløguni og tekur okkum á eina viðkomandi ferð inn í hugaheim Kristleifs.

Enn einaferð megnar Kristleif at bergtaka lurtaran við sínum sterku og einfaldu løgum.

Kristleif liggur í løtuni á einum 9. plássi á 15 teimum bestu við eini útseting av Iron Maiden klassikarinum Number Of The Beast. Fleiri løg av fløguni verða avgjørt at hoyra seinni á listanum hjá ÚF.

Vitja Kristleif á *www.kristleif.com* og *www.myspace.com/kristleifmusic*



**Konsertferðin:**

| | |
|---|---|
| **Mikudag 17.:** | Miðlahúsið í Vágsbortni. Útgávukonsert kl. 20.00. |
| **Hósdagin 18.:** | Leikalund, Klaksvík. Kristleif spælir og signerar fløgur kl. 17.00 |
| | Virkishúsíð, Klaksvík. Ókeypis konsert kl. 20.00 |
| **Fríggjadagin 19.:** | REX, Konsert kl. 21.00 |
| | Café Natúr, Kristleif spælir kl. 23.00-02.00 |
| **Leygardagin 20.:** | Pakkhúsí í Vági. Konsert kl. 22.00 |



# 200 eiga eitt av ársins rokkløgum í Íslandi

**- Exodus (2015) hjá 200 var eitt av bestu rokkløgunum, ið kom út í fjør sigur maðurin handan íslendsku rokksavnsfløguna Rokkland**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í gjár kom fløgan Rokkland út. Hetta er tvífløga við rokktónleiki, ið kemur út á íslendska marknaðin á hvørjum ári. Á tí einu fløguni eru rokkklassikarar so sum Common People við Pulp, Zombie við The Cranberries, Here Comes Your Man hjá Pixies og Black Hole Sun hjá Soundgarden umframt ymiskt íslendskt. Hin fløgan er við aktuellum rokktónleiki, Millum løgini á tí fløguni er Exodus (2015) hjá føroysku 200 umframt nógv íslendsk løg og Country Girl við Primal Scream, You Have Killed me við Morrissey og The Fallen við Franz Ferdinand.

Maðurin handan fløguna er kendi útvarpsmaðurin og plátuvendarin Óli Palli. Hann er sambært heimildarmanni okkara í Íslandi, Jens Guð, ein av allar best umtóktu útvarpsmonnunum í Íslandi. Í sending á íslendsku útvarpsrásini Rás 2 sunnudagin legði Óli Palli fløguna fram. Um avgerðina at hava 200 við á fløguni segði hann, at teir vóru eitt av hæddarpunktunum á Airwaves í 2005, og at hetta lagið Exodus (2015) í hansara metan var eitt av bestu rokkløgunum, ið var komið út í 2006 og eitt lag, ið hevði rakt hann beint.

Jens Guð vísir á, at henda fløgan verður seld í fleiri túsund eintøkum, og at hetta er ómetaliga gott fyri marknaðarføringina av 200 í Ìslandi, júst eins og luttøkan hjá Høgna Lisberg við lagnum Morning Dew á fløguni 100% Sumarið 2006, gjørdi fyri Høgna.

### Teitur í uppskoti sum besti sangari í Danmark

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

27. januar hevur Teitur møguleika at gerast besti sangari í Føroyum á Planet Awards. Á DMA 3. mars kann hann gerast besti sangari í Danmark.

Danish Music Awards fer av bakkastokki hetta kvøldið, og í gjár vórðu tey, ið eru í uppskoti til heiðurslønir almannakunngjørd. Fløgan hjá Teiti, hevur ikki talst millum tær mest seljandi í Danmark farna árið, men fáar munnu hava fingið so góð ummælir, hetta er ivaleyst partur av orsøkini til, at Teitur telist millum nøvnini, ið eru í uppskoti til heiðurslønina til besta sangara í Danmark.

DMA er ikki at blanda við lítla beiggjan DMA Folk, har Eivør í fjør vann tvær heiðurslønir. Hetta er nógv størri tiltak, ið verður í KB Høllini og verður sent beinleiðis í danska sjónvarpinum.

Teitur skal kappast við fleiri tungvektarar. Tilnevndir eru: Mikael Simpson, Simon Kvamm úr Nephew, Teitur Lassen, Thomas Helmig og Troels Abrahamsen úr Veto.

Teitur skal sostatt kappast við kvarta føroyingin Simon Kvamm, ið saman við bólki sínum Nephew er í uppskoti til seks heiðurslønir við DMA: Ársins útgáva, ársins bólkur, ársins sangari, ársins danska hitt, ársins danska rokkútgáva, ársins sangskrivari. Nephew er eisini í uppskoti til eina planet á Planet Awards. Bólkurin, sum í fjør vann planetina sum besti útlendski bólkur hevur møguleika at endurvinna planetina í ár.

